# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Endamálið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrsins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymiskar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

## Árið 2016

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla íverksetan, ráðgeving, menning og sølu í 2016.

Eins og undanfarin ár, er raksturin støðugt tillagaður soleiðis, at umsitingin átekur sær meira ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti metir stýrið, at stuðulin verður betur gagnnýttur til mennandi verkætlanir. Skipanin, har samskiparin er bindilið millum stýrið og umsøkjaran, ger at umsóknin verður skjótari viðgjørd, og umsøkjarin fær røttu ráðgevingina, viðvíkjandi møguleikum við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi hevur í 2016 umsitið skipasmiðjustuðul, Horizon 2020 SME, sum er ES stuðul til smáar og miðalstórar fyritøkur, umframt heimasíðuna www.invest.fo har m.a. spurningar verða svaraðir um fíggjarlig og skattlig viðurskifti í Føroyum.

Í 2016 hevur Vinnuframi lagt dent á at gerast meira sjónligur sum grunnur, so fleiri fáa kunnleika til teir møguleikar, sum grunnurin hevur at bjóða íverksetarum. Tí varð skipað fyri fleiri tiltøkum. Í januar skipaði Vinnuframi, saman við Granskingarráðnum, NORA og Fiskivinnuroyndum fyri kunningarfundi um stuðulsmøguleikar á Bókasavninum við Løkin. Í januar var eisini skipað fyri einum degi á Hotel Hafnia, har bjóðað var til eitt skeið í, hvussu umsóknir skulu skrivast til ES skipanina SME Instrument, fleiri enn 50 fólk luttóku. Tað var danski serfrøðingurin Uffe Bundgård Jørgensen, sum hevði skeiðið. Í februar hevði Fiskivinnuroyndir árliga fundin á Hotel Føroyum, og har luttók og kunnaði Vinnuframi um stuðulsmøguleikar. Í mai skipaði Íverksetarahúsið og Hugskotið fyri tiltakinum "Hitt ein serfrøðing" á Reinsarínum í Havn, tá luttók Vinnuframi og kunnaði "ein-til-ein" um stuðulsmøguleikar frá Vinnuframa og øðrum. Í september varð skipað fyri Creative Business Cup í Reinsarínum saman við Íverksetarahúsinum og Hugskotinum, hetta var aðru ferð, at skipað varð fyri tiltakinum eftir sama leisti. Í oktober skipaði Vinnuframi saman við Íverksetarahúsinum fyri einum kunningarfundi um patent í Høllini hjá Vinnuframa. Íverksetarahúsið hevði fleiri tiltøk um Íverksetarafeløg í 2016, í november var Vinnuframi við í Miðvági og kunnaði um stuðulsmøguleikar. Í november skipaði Vinnuframi fyri heildagsskeið í Virkisætlan, og tá luttóku fleiri íverksetarar, sum vóru í gongd, ella skuldu í gongd við at gera eina virkisætlan. Í november og desember gjørdi Vinnuframi eitt átak ið fekk heitið "Íverksetan á ferð", hetta var eitt tiltak saman við Íverksetarahúsinum. Vitjað var í Sandavági, við Norðskála, á Sandi, í Vági og í Runavík. Talan var um pop up ráðgeving, og tí varð lagt upp til, at tey sum høvdu

eitt hugskot ella eina ítøkiliga verkætlan høvdu møguleika at fáa eitt prát við Vinnuframa ella Íverksetarahúsið. Átakið var so mikið væl eydnað, at avgjørt varð at halda áfram við tí í 2017 og fara aðra staðni í landinum.

Javnan verður heitt á Vinnuframa um at greiða frá sínum virksemi í sambandi við smærri og størri tiltøk. Tað hevur gingist væl at gera íverksetarar og fyritøkur varhug við, hvat Vinnuframi er, og hvat grunnurin kann bjóða. Eisini vísir ein kanning, sum Vinnuframi gjørdi í 2015, at umsøkjarar halda, tað er grundað á stuðulinum frá Vinnuframa, at teirra verkætlanin er vorðin veruleiki. Av teimum spurdu, søgdu fleiri, at tað er lætt at koma í samband við Vinnuframa og svartíðin er stutt, tí stýrið kemur saman eina ferð um mánaðin. Umsøkjarin kann, um hann ynskir, leggja sína verkætlan fram á stýrisfundinum, tá umsóknin er til viðgerðar. Fleiri umsøkjarar taka av møguleikanum at møta stýrinum og greiða frá verkætlanini, tískil er talan um eina stuðulsskipan, har tað er stutt millum umsøkjara og tey ið skulu taka avgerðina.

Samstarvið við Íverksetarahúsið í Klaksvík og Hugskotið í Havn er styrkt munandi seinastu árini og í 2016 sæst enn meira samstarv enn undanfarin ár. Vinnuframi avgjørdi í 2015 at gera Creative Business Cup til eitt samstarv og bjóðaði í tí sambandi báðum íverksetarhúsunum at vera við at skipa fyri føroysku kappingini. Arbeitt verður framvegis miðvíst við at styrkja sambandið millum Vinnuframi og íverksetarahúsini, so íverksetarin fær bjóðað eina røð av møguleikum at menna sítt hugskot og sína verkætlan.

Vinnuframi og Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hava gjørt eina samstarvsavtalu um Horizon 2020 SME. Í 2015 og 2016 hevur tað verið arbeitt ítøkiligt við at lýsa stuðulsmøguleikarnar í ES skipanini Horizon 2020 SME Instrument, sum er fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Samskiparin hevur í hesum sambandi verið nakrar ferðir í Brússel í samráð við Granskingarráðið, sum umsitur Horizon 2020 skipanina. Vinnuframi hevur fingið samband við ein danskan serfrøðing, sum hevur havt ein stóran leiklut, tá skipanin SME Instrument varð gjørd, tí avgjørdi Vinnuframi á heysti 2015 at bjóða honum til Føroyar at hava eitt skeið í januar 2016, so føroyskar fyritøkur kundu fáa kunnleika til møguleikarnar í H2020 fyri smáar og miðalstórar fyritøkur. Hetta samstarv hevur gjørt, at fleiri føroyskar fyritøkur hava søkt um stuðul í skipanini SME Instrument í 2016.

Játtanin hjá Vinnuframa er á 3,2 mió. kr. og hon fylgir ikki við gongdini av umsóknum og tørvinum á stuðli, tískil er talan um fleiri og góðar verkætlanir, sum stýrið ikki kann ganga á møti grundað á vantandi fíggjarorku. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri fleiri íverksetarar.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vóru í 2016 182 tkr. í mun til 319 tkr. í 2015.

Vinnuframi hevur viðgjørt 64 umsóknir í 2016. Søkt varð um 9.360 tkr. Í stuðli vórðu í 2016 veittar 2.632 tkr., meðan 557 tkr. vórðu afturførdar.

Við árslok 2016 var tøki peningurin 27.854 tkr., meðan játtaður, ikki útgoldin stuðul, var 3.052 tkr.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

---

**iNOVA blómar**

Vinnuframi tók í 2009 stig til at gera eitt granskarasetur. iNOVA varð sett á stovn og í 2013 varð bygningurin tikin í nýtslu. Uppskotið um eitt granskarasetur, og sjálv tilgongdin at gera Granskarasetrið, hevur fleiri ár á baki. Upprunaætlanin var at byggja eitt stórt granskarasetur í Debesartrøð, men henda ætlan varð ongantíð veruleiki. Í 2009 tóku Regin W. Dalsgaard, stýrisformaður í Vinnuframa, Pál Weihe, Deildin fyri almenna heilsu og Sigurð Ó. Vang, nevndarformaður í Fiskaaling, stig til at hittast og røða um eitt granskarasetur í hølunum hjá Vinnuframa. Av tí at soppur varð staðfestur í hølunum, var Rúdrekkasølan Landsins, ið hevði hildið til í hølunum frá byrjan, noydd at finna onnur hølir til sítt virksemi. Sostatt var upplagt høvi, at nýta tómu hølini til eitt granskarasetur og við góðum samstarvi og góðum politiskum vilja, fekk Vinnuframi heimild til at niðurlaga stovnsfæið við 13 mió kr. til at innrætta hølini til gransking. Vinnuframi hevur staðið fyri at innrætta hølini í tøttum samstarvi við flestu aktørar innan gransking í Føroyum.Vinnuframi eigur bygningin á Hoyvíksvegi 51 og leigar út bygning og tól ókeypis til iNOVA, sum síðani leigar út til ymiskar vistarar. Við hesum veitir Vinnuframi ein óbeinleiðis stuðul. Talan er um eina privata- og almenna loysn, har tað almenna letur fysisku karmarnar til privat at reka. P/F iNOVA varð stovnað til tess at reka Granskarasetrið. Ein røð av føroyskum vinnufyritøkum og stovnum hava valdu at seta pening í felagið. Stovnararnir eru: P/F Fiskaaling, Felagið Nótaskip, P/F Bakkafrost, P/F Havsbrún, TF Holding, Framtak, P/F Luna, P/F Marine Harvest Faroes, Sp/f Tavan og MBM. Felagið varð sett á stovn við 1,3 mio. kr. í kapitali. Samstarvið millum tað privat og almenna hevur eydnast væl. Millum áhugaverdu verkætlanirnar á iNOVA eru HerGen verkætlanin, sum Amplexa stendur fyri. Verkætlanin snýr seg um at kortleggja arvaeginleikarnar hjá sild, og finna arvaliga munin á fýra ymiskum sildastovnum. Ein onnur verlætlan er FarGen, sum er ein verkætlan hjá Ílegusavninum. Endamálið við FarGen-verkætlanini er at lesa arvastreingin (genomið) hjá øllum føroyingum, sum vilja tað.

**Framtíðin**

Tað eydnaðist í fleiri førum at gera Vinnuframa meira sjónligan í 2016, bæði online og við tiltøkum. Í 2017 verður arbeitt støðugt víðari við, at Vinnuframi skal gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur, tí aðalmálið hjá Vinnuframa er, at stuðulin kemur út til tær verkætlanir, har hann ger størst gagn føroyska vinnulívinum at frama. Tí varð avgerð tikin í 2016 um at gera eina nýggja heimasíðu og hon kom í 2017.

Vinnuframi hevur játtað at taka fleiri uppgávur á seg fyri Uttanríkis- og Vinnumálaráðið. Hesar uppgávur verða ein partur av umsitingini í 2017, millum annað umsitingin av Filmshúsinum.

Íverksetan í Føroyum skal vera meira samanhangandi og streymlinjað, tí vil Vinnuframi, saman við Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og øðrum, sum varða av íverksetarum, arbeiða fyri, at íverksetarin fær betri møguleikar og umstøður at fremja sítt hugskot.

Góða samstarvið við íverksetarahúsini í 2016 heldur áfram, tí verður í 2017 talan um fleiri felags átøk og tiltøk, sum varpað ljós á íverksetan í Føroyum. Creative Business Cup verður millum annað aftur í 2017, tó eftir einum øðrum leisti. Føroyska umboðið fær møguleika at luttaka í altjóða kappingini í Keypmannahavn, sum verður í november 2017. Í altjóða kappingini luttaka fleiri enn 50 lond.

Vinnuframi fer aftur í 2017 at skipa fyri "Íverksetan á ferð" saman við Íverksetarahúsinum ymsa staðni í Føroyum.

Ein avbjóðing hjá føroyskum íverksetararum er, at í Føroyum eru fá, sum bjóða seg at fíggja ella gera íløgur í váðafúsar verkætlanir. Vinnuframi hevur í fleiri førum sæð góðar verkætlanir, sum steðga upp, grundað á, at ongin váðafúsur kapitalur er at finna í Føroyum. "The valley of death" er eitt kent fyribrigdi innan íverksetan, tó tykist trupulleikin at vera størri í Føroyum, tí onki felag hevur sokallaðan venture kapital. Vinnuframi hevur í fleiri førum gjørt vart við hetta og fer tí støðugt at varpa ljós á trupulleikan í 2017. Í samráð við tey, sum varða av íløgum- og fíggingarmøguleikum, vil Vinnuframi finna eitt felags stev fyri váðafúsar verkætlanir, so fleiri føroyskar verkætlanir kunnu gerast veruleiki.

**Verkætlanir frá 2016**

Niðanfyri sæst ein lýsing av seks av teimum 36 játtaðu verkætlanunum, sum fingu stuðul í 2016. Tað eru fleiri aðrar áhugaverdar verkætlanir játtaðar, men tær eru m.a. vardar av upphavsrætti og verða tískil ikki lagdar fram fyri almenninginum, fyrr enn patent v.m. er avgreitt, ella tá vøran er komin á marknaðin.

VERKÆTLAN 1

Umsøkjari: Kirvi

Verkætlanin í stuttum: Sølumessa í Herning

Lýsing: Kirvi er ein fyritøka, sum byrjaði virksemið sítt í 2010 og heldur til í Lopra. Vatnið, sum kemur úr tunlinum millum Lopra og Sumba, verður tappað á fløskur og síðani selt í leysasølu og til fyritøkur. Sølan er fyri tað mesta í Føroyum.

Stuðul: Kirvi søkti um stuðul at fara á catering messu í Herning í mars 2016. Stýrið gekk umsóknini á møti á stýrisfundi í januar 2016.

Endamál: Kirvi ynskir at koma inn á útlendska marknaðin, tí helt leiðslan í felagnum, at messan í Danmark var eitt upplagt høvi og var tað cateringvinnan, sum var fokusøkið.

Úrslit: Fólkini handan Kirvi komu í samband við fleiri møguligar kundar á messuni og aftaná varð arbeitt miðvíst at fáa avtalur í lag við hesar. Vatnið varð væl móttikið og ongin ivi er um, at Kirvi er góð vøra, sum hevur fyrimunir, fram um aðrar, tó er talan um harða kapping, tí nógv sløg av vatni eru á danska marknaðinum.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

---

VERKÆTLAN 2

Umsøkjari: Guðrun & Guðrun

Verkætlanin í stuttum: Søluátak í USA í 2017

Lýsing: Guðrun & Guðrun er ein føroysk fyritøka, sum sniðgevur og selur bundnar vørur á altjóða marknaðinum. Guðrun & Guðrun hevur ein nethandil umframt ein fysiskan handil í Havn og til tíðir pop-up handlar í Olso, Keypmannahavn og London. Selt verður harumframt til yvir 60 handlar um allan heimin. Tað eru tær báðar Guðrun Rógvadóttir og Guðrun Ludvig, sum eru kvinnurnar handan fyritøkuna.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði í oktober stuðul til verkætlanina hjá Guðrun & Guðrun.

Endamál: Guðrun & Guðrun vil við hesi verkætlan koma inn á amerikanska marknaðin. Ætlanin er at fáa Guðrun & Guðrun inn í 50 handlar í USA.

Úrslit: Verkætlanin er enn í gongd, men longu nú er sølan í USA økt munanandi.

VERKÆTLAN 3

Umsøkjari: Ravn Watches

Verkætlanin í stuttum: Sølumessa í Svøríki

Lýsing: Ravn Watches er eitt nýtt føroyskt ur. Hvørt element í ymisku sniðunum hevur íblástur úr føroyskari mentan og verður urið brandað sum føroyskt design.

Stuðul: Stýrið fyri Vinnuframa játtaði í august stuðul til sølumessu í Svøríki.

Endamál: Precious Fair er ein messa innan ur og smúkkur. Ravn Watches luttók í november á messuni við 17 ymiskum sniðum, men valdi tó at leggja dent á tað eina sniðið.

Úrslit: Á messuni komu fólkini handan Ravn Watches í samband við tvær stórar ketur innan ur. Eisini komu tey í samband innkeyparar úr Íslandi og Bretlandi. Ein ítøkilig avtalað varð gjørd við eitt svenskt umboð, sum skal standa fyri søluni í Svøríki.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

VERKÆTLAN 4

Umsøkjari: Undirgrund

Verkætlanin í stuttum: Undirgrund á danska marknaðin

Lýsing: Undirgrund er ein fyritøka, sum framleiðir og selur vørur úr gróti. Tríggir mans manna felagið, tveir jarðfrøðingar og ein verkfrøðingur.

Stuðul: Stýrið játtaði í mars stuðul til verkætlanina hjá Undirgrund.

Endamál: Fyrsta vøran hjá Undirgrund var "whisky-grót". Hon varð so mikið væl móttíkin, at tað varð útselt áðrenn jólini 2014. Í 2015 kom framleiðslan í eina fasta legu. Í desember 2015 kom næsta vøran frá Undirgrund, undirløg til gløs/koppar.

Undirgrund vil við hesi verkætlan koma á útlendska marknaðin við eini røð av vørum, fyrst og fremst er talan um tann danska marknaðin. Ætlanin var at luttaka á messum og at selja beinleiðis til gávu- og búnýtishandlar. Teir fingu hjálp og ráðgeving frá Censure, sum er fyritøkan handan urið Kanske, til at skapa eitt brand, og at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri danska marknaðin.

Úrslit: Undirgrund luttók á tveimum sølustevnum í Danmark í 2016, og nakrir danskir ordrar komu burtur úr. Verkætlanin er enn í gongd, og teir tríggir, handan Undirgrund, rokna við, at tá lýsingafilmurin er liðugur, fer hann veruliga at seta ferð á online søluna.

VERKÆTLAN 5

Umsøkjari: Pól Sundskarð

Verkætlanin í stuttum: Menning av heimasíðuni www.hiking.fo

Lýsing: Ferðavinnan í Føroyum er í stórum vøkstri, nógv av ferðafólkunum velja at ganga fjøllini tá tey eru í Føroyum, men eisini føroyingum dáma væl túrar í fjøllunum. Hesir túrar kunnu tó vera vandamiklir, um talan er um fólk, sum ikki eru staðkend, ella ikki hava sett seg nóg væl inn umstøðurnar viðvíkjandi gongutúrinum. Pól Sundskarð hevur í mong ár gingið í fjøllunum í Føroyum og hevur verið á øllum føroyskum fjallatindum, í tí sambandi hevur hann skrásett allar positiónir, umframt tað, hevur hann skrásett nógvar bygdagøtur runt allar Føroyar.

Stuðul: Vinnuframi játtaði, í september 2016, stuðul til menning av heimasíðuni www.hiking.fo

Endamál: Allar slóðir og positiónir, sum Pól Sundskarð hevur skrásett skuldu samlast á einari síðu, sum hevði til endamáls at kunna ferðafólk og føroyingar, sum ætla sær út í fjøllini at ganga. Heimasíðan www.hiking.fo er eitt stað, sum upplýsir um túrar, hevur góð ráð og tað ber eisini til at keypa túrar og slóðir til gongutúrar á heimasíðuni. Síðan upplýsir, hvussu ein skal vera ílatin, ymisk torleikastig á ymsu túrunum, men ikki minst, hvar fólk ikki skulu fara. Samstundis sum síðan hevur eitt upplýsandi endamál, so hevur hon eisini til endamáls at selja gongutúrar og slóðir.

Úrslit: Heimasíðan kom út 8. mars 2017. Longu áðrenn summarið byrjaði, var síðan nógv vitjað, tí eru góðar vónir um, at vitjanir og sølan á síðuni fer at vaksa enn meira í háárstíðini, sum er fyri framman.

VERKÆTLAN 6

Umsøkjari: Sp/f Sjógæti

Verkætlanin í stuttum: Sjógæti á danska marknaðin

Lýsing: Sjógæti er ein fyritøka, sum liggur við Norðskála, hevur fýra starvsfólk og framleiðir í høvuðsheitinum til føroyska marknaðin. 15% av framleiðsluni verður útflutt.

Stuðul: Vinnuframi játtaði í mars 2016 stuðul til Sjógæti í sambandi við eina cateringmessu í Herning

Endamál: Sjógæti ynskir at økja um søluna á danska marknaðinum, tí varð avgerð tikin um at fara á messu í Herning og hava ein kokk við, so møguligu nýggju kundarnir fingu høvið at royna vøruna á staðnum. Eisini var føroyska fyritøkan Kirvi við, og gav hetta møguleikan at sameina føroysku fiskavøruna og føroyska vatnið á einum staði.

Eini 5000 fólk fingu smakkiroyndirnar frá Sjógæti, har í millum vóru kend fólk, sum James Price, frá Brødrene Price og Anne Hjernøe frá AnneMad. Fleiri fyrispurningar komu á sjálvari messuni, og konkret samstørv spurdust burtur úr luttøkuni á messuni í Herning, sum hevur verið við til at økt um útflutningin hjá Sjógæti.

## Hagtøl




Játtaði stuðulin hjá grunninum seinastu fimm árini (í túsund krónum):

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgeving | 0 | 150 | 609 | 605 | 465 |
| Menning | 939 | 766 | 1810 | 1810 | 915 |
| Søla | 1522 | 1492 | 1302 | 950 | 1252 |
| Íalt | 2461 | 2408 | 3721 | 3365 | 2632 |




Samlað fyri árini 2012-2016 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli: